

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 03 - 2013

# Turrur brunnur hjá Lundin

Lundin fann onga olju í Jorvik-brunninum við Edvard Grieg-leiðina í Norðsjónum. Brunnurin er boraður einar fimm kilometrar eystan fyri brunnin 16/1-8 á Edvard Grieg-leiðini. Oljustýrið sigur, at tekin er um olju, men tó ikki soleiðis, at tað ber til at ávísa, at olja er har, og tí er brunnurin staðfestur sum turrur, sigur oljustýrið. Lundin er operatørur á leiðini við 50 prosentum av loyvinum. Hini feløgini í loyvinum eru Wintershall Norge (30 prosent) og OMV (20 prosent). Tað var Transocean Winner, sum boraði brunnin. Hann skal nú at bora fyri Marathon Oil Norge, skrivar Aftenbladet. Lundin var annars tað oljufelagið, sum var við til at finna risa oljukelduna Johan Sverdrup 2011. Ikki færri enn tveir føroyingar sita i leiðandi størvum i felagnum, havnarmaðurin Teitur Poulsen og klaksvikingurin Tummas Pauli Myri.